# Ellisakfør vitjaðu ellisakfør í Hetlandi





*Við á ferðini vóru Hans Elmar við Chevrolet frá 1931, Ingi við Ford A frá 1930 og Hans Jørn við Triumph frá 1970 og so ikki at gloyma konurnar!*

**Í døgunum 18. - 22. september vitjaði ferðaag úr Føroyum í Hetlandi**

*Ingi Justinussen*

Í heyst varð skipað fyri eini lítlari hetlandsferð. Túrurin kom í lag eftir at Maurice Mullay frá hetlendska felagnum hevði sett seg í samband við okkum. Hann ferðaðist í Føroyum og helt, at tað kundi verið stuttligt, um feløgini fingu eitt betri samband framyvir. Hann greiddi frá, at teir annað hvørt ár skipaðu fyri einari framsýning, Shetland Classic Motor Show, og næstu ferð verður í 2004.

Hetta gjørdi, at vit hildu tað vera áhugavert at gera eitt rend til Hetlands, eisini tí at sambandið landanna millum við Norrønu er vorðið avbera gott.

Seint hóskvøldið tann 18. september fóru vit so til Hetlands við Norrønu. Við á ferðini vóru Hans Elmar við Chevrolet frá 1931, Ingi við Ford A frá 1930 og Hans Jørn við Triumph frá 1970 og so ikki at gloyma konurnar.

Túrurin niður var friðarligur, og á bryggjuni í Lerwick var onkur møttur upp at taka ímóti okkum. Blíðskapurin var óførur - teir høvdu gjørt eina skrá og skipað fyri túrum bæði fríggjadag og leygardag.

Aftan á at vit høvdu skrivað okkum inn á Shetland Hotel gekk túrurin norðureftir. Vit vitjaðu eitt lítið virki, Shetland Jewellery, har tey m. a. framleiddu silvurprýði. Síðan varð farið longri norður til Busta House Hotel at drekka kaffi. Haðani koyrdu vit til Sullum Voe og hugdu at oljuterminalinum.

Um kvøldið vórðu vit boðin út at eta indiskan mat - tað reina krút, men væl smakkaði.

Leygardagurin byrjaði við shopping, og seinnapartin fóru vit suðureftir til Sumburgh Head. Har steðgaðu vit eina løtu, áðrenn vit vitjaðu eina gamla myllu, Quendale Mill.

Vegirnir eru fínir í Hetlandi. Høvuðsvegirnir líkjast okkara, men eisini eru nógvir smáir vegir við vendiplássum, sum vit kenna teir frá fyrr í tíðini. Eftir eru bert góð minnir, og vit gleða okkum at vitja aftur eina aðru ferð.


Stór goymsla av dygdargóðum Bosch dynamoum og startarum

Dygdarinnsiglið frá Bosch borgar fyri, at luturin eftir umvæling á Bosch-verksmiðjuni er eins góður og ein nýggjur.



ama Postboks 3061 - 110 Tórshavn - tel 31 38 16

Sosialurin

Lesið um bilar í Sosialinum hvønn hósdag!

www.sosialurin.fo • tel 341800 • fax 341801 • teldupostur: post@sosialurin.fo

F.A. BILLUTIR

Í Líðini - 410 Kollafjørður

tel 421605 • fax 421666 • far 210095




# Turt í brunninum á jólum

**Lekar verða tettir og avfuktingarskipan sett upp í brunninum við Gráastein. Gongst sum nýggja nevndin við størri heimildum vil, so verður relativa luftvætuinnihaldið í brunninum niðan fyri 55% á jólum – og harvið kann brunnurin trygt hýsa ellisakførum**

*Eirikur Lindenskov*

**Brunnurin:** Fastur táttur í nærum hvørjum blað seinastu árini hevur verið brunnurin. Hóast tað kann tykjast, at blaðnevndin hevur fyri javnt og samt at mala somu køku, so eru tó tekin um, at brunnurin loksins kann gerast tryggur karmur um varðveitslu av ellisakførum.

Tað er ein royndur lutur, at umstøðurnar ikki hava verið nóg góðar, hvat vætuinnihaldi viðvíkur. Fyri at sleppa undan metallkorrosión, at leidningar irra og at inntrekk ferst, so skal relativa vætuinnihaldið í brunninum niður ímóti 50%. Royndir, tiknar í brunninum, bæði við og uttan hita, vísa, at vætuinnihaldið er beint undir 100%.

Á seinasta aðalfundi felagsins varð gjørd tann broyting, at nevndin fyri brunnin skal hava fulla og alla ábyrgd fyri brunninum. Hesa ábyrgd hevur nevndin tikið á seg og er farin til verka.

Eitt tað fyrsta, ið gjørt var, var at áseta leigugjald og at senda út rokningar til teirra, ið eiga akfør og lutir í brunninum. Hetta hevur givið nakað av tøkum peningi í kassan, hóast tað hevur volt nevndini óneyðugt stríð at fáa øll at gjalda. Treytin framyvir fyri at fáa lutir goymdar í brunninum verður, at leiguavtala verður undirskrivað. Tey akfør ella lutir, ið ikki rindað verður fyri, verða beind burtur fyri eigarans rokning.

Annað tiltak, ið nevndin fyri brunnin hevur skipað fyri, var ólavsøkuframsýningin, sum var sera væl vitjað.



*Martin stríðist í brekkaranum, Niels Pauli peikar og Heini lurtar…*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Vætan skal út

Til tess at koma vætutrupulleikanum í brunninum til lívs, hevur nevndin fyri brunnin gjørt av at keypa eina avfuktingarskipan av slagnum Munters. Fleiri av teirra skipanum eru royndar í Føroyum.

Við hesi skipan verður ikki neyðugt at hita brunnin til tess at lækka vætuinnihaldið í luftini. Ein slík avfuktingarskipan megnar at fáa vætuinnihaldið niður um 55%, og tá er líkamikið, hvør temperaturin er. Hetta ger, at tað verður bíligari í rakstri. Annar fyrimunur er, at tað verður lættari at hita bygningin – ella part av bygninginum, tá vætuinnihaldið er lægri.

Fyri at tryggja sær, at hetta er tað rætta at gera, so hevur nevndin spurt okkara egna Hergeir Petersen og ráðgevandi verkfrøðingarnar, Martin E. Leo og Svenn Brimheim, sum eru vanir at fáast við slíkar skipanir. Teir siga allir, at hetta er rætta loysnin, men leggja dent á, at brunnurin má tettast, tí um væta sleppur inn samstundis sum avfuktingarskipanin skal fáa vætuna út, so kann tað gerast ein dýr søga.

Arbeiðið at tetta lekar er fyri langari tíð síðani byrjað, men hevur staðið í stað eina tíð. Tó er nú gongd komin á aftur. Tað fyrsta var at fáa tætt undir hurðini. Har er løgd renna framman fyri hurðini og frárensl lagt í gólvið saman við samlibrunni og rist til at taka skolivatn av gólvinum. Samstundis sum hetta arbeiðið varð gjørt, vær gólvið innan fyri hurðina brekkað upp soleiðis, at lættari er at koyra inn.

Næsta »byggistigið« at koma vætutrupulleikanum til lívs, er at tetta brunnin í ovaru síðu. Har er brunnurin illa frostsprongdur soleiðis at væta rennur niður í lagingina og soleiðis inn í brunnin. Har verða settir upp formar og stoypt íaftur, soleiðis at vatnið verður ført niðar av steinsetingini.

Í løtuni eru samráðingar við býráðið í Havn um hetta arbeiðið. Tað er soleiðis, at grannar hjá brunninum í fleiri ár hava kært sína neyð fyri býráðnum, tí flakar av pappi o. ø. er fokið av brunninum. Býráðið hevur játtað grannunu at gera hetta arbeiðið, áðrenn leigusáttmáli varð gjørdur við Føroya Ellisakfør. Nevndin fyri brunnin sigur, at hon hevur tosað við býarverkfrøðingin um hesi viðurskifti, og at fundur er avtalaður við býráðsskrivaran, Jens Marius Poulsen, um hesi viðurskifti, sum væntandi verða avgreidd um fáar vikur.

Nevndin fyri brunnin ímyndar sær, at avfuktingarskipanin kann standa uppi einaferð í november ella desember, og at flestu lekarnar kunnu verða tettir í sama tíðarbili.

Soleiðis vónar nevndin veruliga, at tað verður turt í brunninum á jólum.



*Henrik Jensen frá Alma, Eirikur Lindenskov, Hans-Henrik Thomsen frá Munters, Heini á Borg og Brynjálvur Jensen í brunninum og tosa um vætuviðurskiftini*

*Mynd: Jan Barbre*